

*Nógv ætla sær á konsert hjá Gluntan*

# Eru framvegis vælumtóktir

*Gluntan hevur spælt í 32 ár, og í Føroyum er gravgangur eftir atgongumerkjum, sigur Skyrak Booking, ið skipar fyri ferðini*

Skyrak Booking sigur í tíðindaskrivi:

Nú eru bert nakrir dagar eftir, til kendi norsku bólkurin Gluntan kemur til Føroya. Gluntan er ein sera gamal bólkur, sum hevur megnað at hildið seg á tindinum í 32 ár. Í øll hesi ár hava teir ferðast runt og spælt. Teir hava ikki ligið á latu síðuni, tá ið talan er um at geva út. Hesi árini hava teir givið út 31 lp/cd/mc. Tað eru ikki nógvir bólkar, sum hava givið so nógv út. Í ár hava teir givið sína fyrstu live plátu út. Hon eitur »Gluntan levandes live«. Á fløguni eru teir sangirnir hjá Gluntan, ið er best umtóktir, líka frá slagarum frá 1968, »Langs hver en vej« og heilt til nýggj løg sum »Kærlighed og pølse« og »Det er fredag«. Hetta er eyðkendur Gluntan tónleikur í dag.

Vanliga, tá ið Gluntan hevur verið í Føroyum, hava teir bara spælt tvær ferðir, men av tí at teir koma um ólavsøkutíð í ár, fáa teir spælt 4 kvøld. Teir spæla á fyrst í KÍ-høllini í Klaksvík 25. juli. Dagin eftir, leygardagin 26. juli, fáa suðuroyingar høvi at hoyra Gluntan í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

Á ólavsøku spælir Gluntan 28. og 29. juli í Gundadalshøllini.

Ætlanin er at kvøldini skulu vera sum Gluntan-kvøldini eru í Noreg. Tá verða borð sett upp og fólk kann keypa sær okkurt til matna og at drekka. Fyri at gott pláss skal vera at dansa, verður avmarkað atgongd.

Longu nú verða atgongumerki seld kring landið og tað frættist, at Gluntan eru enn líka væl umtóktir, sigur Skyrak Booking í tíðindaskrivinum.

*Gavin Hills-Jones, Westernstjóri væl nøgdur:*

# Fleiri „nýggj“ oljufeløg keypa nú føroyskan seismikk

JAN MULLER

Áhugin fyri føroyska landgrunninum er ómetaliga stórur. Hóast nógv av teim um stóru oljufeløgunum longu hava keypt seismiska kanningartilfarið frá Western, sum í 1994 og 95 skjeyt seismikk á øllum tí føroyska landgrunninum, so koma fleiri og fleiri feløg aftrat. Gavin Hills-Jones, marknaðarstjóri hjá Western sigur við Sosialin, at teir hava verið sera væl nøgdir við áhugan frá oljufeløgunum, og tað at fleiri og fleir feløg aftrat vísa áhuga fyri tilfarinum, er bara at fegnast um.

Hann vil ikki upplýsa hvørji feløgini eru, men Sosialurin skilur, at talan er eisini um feløg, sum als ikki hava víst føroyska økinum áhuga fyrr.

Western hevur eisini fleiri nýggjar uppgávur. Eitt nu skulu teir halda fram við at skjóta seismikk við tveimum skipum fyri Amerada Hess-oljusamtakið. Hetta byrjaðu teir í fjør og úrslitið var so mikið gott, at teir fara at halda fram í august mánað - í einar 2-3 vikur. Teir vilja nú skjóta fleiri linjur á sama øki.

Gavin Hills Jones sigur, at oljufeløgini hava eisini stóran áhuga fyri tí Hvíta økinum, so ein skjót loysn á marknatrætuni kann fáa stóran týdning fyri oljufeløgini, sum fegin ynskja at fáa hetta økið við í teirra framtíðar kanningar.

Western er eisini farið at fyrireikað seg til fyrsta útbjóðingarumfari í føroyskum øki. Tí so skjótt loyvi verða givin at bora, so verða av álvara boð eftir seismikkfeløgunum, og tá verður helst arbeiði til tey øll.

Umframt Western eru eisini fleiri onnur seismikkfeløg áhuga í at gera kanningar her. Nøkur teirra eru Geco Prack, PGS, Geoteam og Digicon.

Digicon og PGS hava longu gjørt 3d seismikk í føroyskum øki, nakað, sum annars vanliga fyrst plagar at koma eftir eina lisensrundu. Hetta sigur so mikið sum, at vónirnar til at finna okkurt eru stórar.

BP hevur júst gjørt umfatandi seismiskar kanningar við Føroyar. Hesar hava verið gjørdar sunnan fyri og somuleiðis vestan fyri Suðuroynna.

Annars hevur oljufelagið Arco fingið loyvi til at gera serstakar kanningar á landi í Suðuroynni. Talan er um magnetiskar og elektriskar kanningar, har endamálið er at máta, hvussu tjúkt eitt møguligt sediment lag millum basaltið og grundfjallið er. Hetta er sera avgerandi fyri at gera nakrar metingar av møguleikunum fyri at finna olju og gass. Útgangsstøðið hjá felagnum er Lopransholið.


NÝGGJ & BRÚKT



LANDBÚNAÐARAMBOÐ

HANIX MINIGRAVARAR frá 800 kg til 5 tons

Sera biligir eykalutir – og nógv biligast av sínum slag

Fáast við bæði gummi- & stálbeltum, sum kunnu skiftast eftir 10 minuttum



Frá 119.000,-

TEKNISK DATA

| | H08A | H12A | H15A | H22A | H29A | H35A | H45A |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vekt kg | 800 | 1330 | 1470 | 2330 | 3000 | 3200 | 4550 |
| Grevstrandýpd | 1600 | 2020 | 2180 | 2400 | 2700 | 3000 | 3585 |
| Breidd mm | 700-900 | 1000 | 1000 | 1380 | 1520 | 1520 | 1850 |

Mest seldi minigravari í Føroyum. Eisini hava vit nakrar TIELBURGER sláimaskinur, ið verða seldar sera bíliga. Hava eisini viðfestisvognar, hydr. hamrar o.m.a.

Ring og fá eitt maskinprát Tlf. 22394 • 86394 • 84792

Hjálpa eisini við fígging!

Ó.K. HEILSØLA 430 Hvalvík Tlf. 22 394

Føroyskur dansur á ólavsøku í Hollywood



Tøkum Lætt skipar fyri

HOLLYWOOD